# Jan Christiansen ivasamur um parkeringsgjald

Fyrrverandi borgarstjórin í Tórshavnar kommunu, ivast stórliga, um tað er eitt gott hugskot at krevja gjald fyri parkering í býnum. Jan Christiansen, fyrrverandi borgarstjóri og núverandi andstøðulimur í Tórshavnar býráð, heldur, at ætlanini at krevja gjald fyri parkering, kann geva eitt stórt bakkast. - Miðbýurin er longu næstan deyður, og tað plagar at vera lætt at finna parkeringspláss, so eg ivist stórliga, um tað fer at tæna miðbýnum, at fólk verða noydd at rinda fyri at parkera har, metir hann. - Tað er stórur vandi fyri, at ongin fer at tíma oman í býin, sigur hann somuleiðis. Men Jan Christiansen heldur hinvegin, at kanska er tað ein háttur at fáa meiri pening inn til kommunukassan, sum ikki hevur tað so øgiliga gott í løtuni.


Demich P/F
demich@demich.fo
www.demich.fo
Vit sóknast eftir
Verkstaðsleiðara/blikksmiði
les meira á síðu 8
demich
hiti | vatn | sanitet

Sosialurin
Nr. 98 • Týsdagur • 26. mai 2009 • 83. árg. • Kr. 20,00

Champions League:
Sætta uppgerðin millum risarnar
Ítr 19-22

Elin er nú leiðandi miðlaserfrøðinghur
Síða 9

Starvsfólk á Dimmu niður í løn
Síða 6

Hósvíkingar mintust sjólætnar
Síða 10

- Havnin er ein stórbýur, og í einum stórbýi rindar tú fyri at seta bilin. Tað sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu
Síða 4

TÚ SKALT GJALDA FYRI AT PARKERA

TÍN ÚTBÚGVING – TÍN FRAMTÍÐ
FHS OG HH

KJØTRÆTTIR SKELJADJÓR FISKUR PASTA PIZZA DURUM
Matur til einhvønn góma

Brek á Prentmiðstøðini
Fyrrapartin í dag hendi eitt óhapp á Prentmiðstøðini sum førir við sær, at teir ikki fáa prent-


Marin Katrina Frýdal, forkvinna í teknisku nevnd, sum her setir skivuna, vónar, at tað verður minni enn eitt ár, til tú skalt rinda fyri at seta bilin í miðbýnum
Mynd: Jens Kristian Vang

# Parkeringsgjald í 2010

**Marin Katrina Frýdal, forkvinna í teknisku nevnd hjá Tórshavnar Kommunu, vónar, at tað verður innan eitt ár, at parkeringsgjald verður kravt**

PARKERING
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Sum Sosialurin skrivaði í gjár, so arbeiðir Tórshavnar kommuna við eini ætlan, har tað millum annað er meiningin at krevja gjald fyri parkering á parkeringsplássum í miðbýnum.

Stendur tað til Marina Katrinu Frýdal, so kemur hetta í gildi, áðrenn eitt ár er farið.

- Vit hava arbeitt konkret við hesum í eitt ár, og eg vóni, at hetta verður klárt innan eitt ár, men tú veitst, hvussu tað er við politikki. Tað kann skjótt draga út, og taka eitt sindur longri tíð, staðfestir forkvinnan í teknisku nevnd.

### Hjálpir aðrastaðni

Hóast handilsfólk helst vilja, at kundin kann koyra til handilsdiskin, so heldur Marin Katrina Frýdal, at tað er eitt gott hugskot, at hava ein bilfrían miðbý.

- Aðrastaðni hava tey gjørt hesi tiltøk, og har var stór mótstøða, men tað kom ígjøgnum. Handlarnir sóu eina afturgongd fyrstu tíðina, men sum tíðin leið, gjørdist umsetningurin størri enn hann var frammanundan, sigur Marin Katrina Frýdal.

### Tvey ávís pláss

Í uppskotinum til forfundin, sum verður hósdagin, eru tvey ávís parkeringspláss nevnd. Skálatrøð og tað í Mortanstovubrekku. Men sambært Marini Katrinu Frýdal er ikki ætlanin at steðga har.

- Eg dugi væl at ímynda mær, at tey flestu parkeringsplássini í miðbýnum verða umfatað av einum gjaldi, sigur forkvinnan í teknisku nevnd.

Hon staðfestir eisini, at ferðslan í býnum er ein ruðuleiki, og at ein bilfríur miðbýur hevði bøtt munandi um hetta.

# Fólkið noktar at rinda

**Sosialurin tosaði við nøkur fólk, sum høvdu sett bilin á Skálatrøð í morgun, og næstan øll eru ímóti at rinda fyri at parkera. Høvuðsargumentið er, at Skálatrøð er eitt av fáu støðunum, har tú fært sett bilin í óavmarkaða tíð, umframt, at mann ikki hevur tíð at ganga til ymisku støðini í býnum**

## Fólk hava tørv á bilinum

Hans G. Thomsen, sum arbeiðir í handilsvinnuni í miðbýnum, heldur tað vera øgiliga langt úti, at fólk verða noydd at rinda fyri parkering í Miðbýnum.

- Eg haldi tað er øgiliga langt úti, tað eru longu heilt fá parkeringsplássi frammanundan, og tí átti kommunan heldur at útvega fleiri parkeringspláss, og tørvurin hevur ongantíð verið so stórur, sigur Hans G.Thomsen.

Hann heldur tað eisini vera skeivt at hava ein bilfrían miðbý.

- Eg arbeiði sjálvur í miðbýnum, og fólk hava tørv á at koma við bilinum í miðbýin. Og at seta bilin í Gundadali hoyrir einari farnari tíð til, tí fólk hava ikki tíð til tað, sigur hann


*Hans G. Thomsen, arbeiðir í miðbýnum og dugir illa at ímynda sær, at fólk skulu rinda fyri parkering*
*Mynd: Eirikur í Jákupsstovu*

## Tey plaga at herma

Kristian R. Petersen av Stykkinum setti bilin á Skálatrøð í morgun, og hann visti av ongum.

- Skulu tey seta parkometur upp, spyr hann, tá hann fær at vita um ætlanirnar.

- Tey plaga eisini at herma eftir útlendingum, bæði til gott og ilt, men hetta er einasta staðið vit hava at seta bilin, har hann stendur ekkaleysur, sigur hann.

Spurdur um hann ikki kundi gingið í góða veðrinum í dag, er hann avgjørdur.

- Eg búgvi á stykkinum, so tað hevði verið nakað langt, staðfestir hann.


*Kristian R. Petersen av Stykkinum heldur tað vera íðan ov langt at ganga av Stykkinum til Havnar*
*Mynd: Eirikur í Jákupsstovu*

## Fult lógligt at krevja gjald

Sambært fútanum, Karen Marie Olsen, er tað ongin lóg, sum forðar Tórshavnar kommunu, at krevja gjald fyri parkering á økjum hjá kommununi.

- Eigur tú eitt stykki, so kanst tú leiga tað út til parkering, um tú hevur hug til tað, sigur Karen Marie Olesen.